> *Nú ein dagin, eg var í Leirvík, segði eitt barn við meg: 'Hví ert tú so lítil?' Tá svaraði eg bara aftur, at øll síggja ikki eins út, og at summar mammur eru lítlar, meðan aðrar kanska eru langar, klænar ella tjúkkar. Og tað haldi eg eisini, at hann skilti.*



*Trý ára gamla Sólja blaðar í einari fotomyndabók. Í bókini eru millum annað myndir av Jenny á sjúkrahúsinum, og Jenny greiðir alt fyri eitt Sólju frá, hvussu læknarnir royndu at hjálpa sær*



## Fall fyri sjarmuni

Fyri tveimum árum síðani giftust Jenny og Evan í kirkjuni í Sørvági. Hóast Evan er 1,80 metrar til hæddar, hevur hann ongantíð verið keddur ella hugsað um, at kona hansara er um hálvan metur minni enn hann. Og tá Jenny minnir hann á, at hon bert var 1,20 metur, tá tey komu saman, svarar Evan brosandi og argandi: - Ha? Vart tú so lítil? Men hann leggur tó alt fyri eitt afturat, at hann við fyrsta eygnabrá fall fyri sjarmuni.

hjá vanligum, frískum fólkum, men stórverk í mínum hugaheimi, greiðir Jenny frá.

### Eingin forðan

Men hóast viðgerðin hjá Jenny enn er klár í hugaheimi hennara, hugsar hon dagliga ikki um, at hon er vakstrartarnað:

– Eg havi ongantíð hugsað, at eg síggi øðrvísi út. Og tað, at eg bert eri 1,35 metrar til longdar, hevur ongantíð forðað mær í at gjørt nakað sum helst. Sjálvsálitið hevur altíð verið í topp, sigur Jenny og leggur afturat, at tað tó ofta eru fleiri, sum hyggja eitt sindur eftir henni og spyrja ymiskt, tá tey síggja hana á gøtuni:

– Nú ein dagin, eg var í Leirvík, segði eitt barn við meg: 'Hví ert tú so lítil?' Tá svaraði eg honum bara aftur, at øll síggja ikki eins út, og at summar mammur eru lítlar, meðan aðrar kanska eru langar, klænar og tjúkkar. Og tað haldi eg eisini, at hann skilti.

Børnini hjá Jenny hava heldur ongantíð verið darvað av, at hon ikki er líka stór sum hinar mammurnar. Heldur ikki Hilmar, sum eftir summarfrítíðina byrjar í øðrum flokki:

– Tað eru altíð so nógv børn inni hjá okkum á vitjan. Øll hava vant seg við, at eg ikki eri so stór, og tað halda tey ikki vera løgið, sigur Jenny.

### Tvey vælskapt børn

Vakstrartarnað hava ofta trupulleikar við at fáa børn, men Jenny hevur verið heppin og fingið, sum sagt, tvey væl skapt børn:

– 50% av okkum, sum eru vakstrartarnað, fáa børn, ið somuleiðis eru vakstrartarnað. Og tá eg fekk at vita, at eg var við barn, vildi eg ikki vita frá jarðarmóðurini, um barnið hjá mær somuleiðis hevði trupulleikar við vøkstrinum, men tíbetur høvdu børnini ikki hetta brek, sigur Jenny og skoytir uppí, at barnsburðarskeiðið hjá henni gekk sum eftir ánni:

– Hóast eg eri lítil, orkaði eg væl at bera børnini hjá mær. Eg tók ikki meira enn trý kilo uppá, sigur hon glað.

### Keypir klæðir allastaðni

Jenny ásannar, at tað onkuntíð kann vera trupult at finna klæðir, ið passa til hennara. Men hon keypir tó ongantíð klæðir í einum barnahandli:

– Serliga er tað trupult at finna buksur, ið passa. Men antin leggi eg tær upp, ella keypi eg stuttar summarbuksur, ið sum oftast hóska væl til mín, sigur Jenny og leggur afturat, at tað ongantíð er trupult at finna blusur, jakkar ella skógvar:

– Væl at merkja, um eg altso røkki upp á handilshillarnar, men so rópi eg bara á starvsfólkini og sigi, hvat eg skal hava, sigur hon at enda við einum stórum brosi.

Vit takka fyri gott gestablídni og gott drekka. Jenny ger seg klára til at taka myndir, og vit fara út í garðin. Tá stingur ein maður høvdið út um grannadyrnar: – Sosialurin á vitjan? Er fitta Jenny nú aftur vaksin nakrar sentimetrar?, sigur grannin flennandi. Myndamaðurin tekur myndirnar og vit takka fyri okkum og fara rullandi við Snar, ið er bilurin hjá Sosialinum, aftur til Sandavágs.



*Jenny til uppvenjingar stutt eftir skurðviðgerðina.*